

# SKEMMAN *søkir* HANDILSLÆRLING

## Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir.

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum
- Bæði í Føroyum og á eini av deildinum uttanlands
- Løn sambært avtalu

**Vit vænta at tú ert:**
Samstarvsfús/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin at siga tína meining.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk,fáa okkara lærlingur loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Er hetta nakað fyri teg, ert tú vælkomin at senda eina umsókn við prógvum og viðmælum til:

**Skemman – Staravegur 7**
**Postboks 3278 - 110 Tórshavn**
**ella á teldupost: skemman@skemman.fo**

Umsóknarfreistin er 1. oktober 2009

**Meia fæst at vita um læruplássið við at ringja á tlf. 315588 og spyrja eftir Dan Hansen, dh@skemman.fo**

**Kunning um Skemmuna:**
*Í Skemmuni starvast 16 fólk. Eisini eru deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava, Estlandi, Rumenia og Bulgaria. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 22 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans, á øllum deildinum í teimum 8 londunum.*



*Skeið 8. oktober á Hotel Føroyum*

# FRAMLØGUTEKNIKKUR

## - styrk um førleikan at fyrireika og halda fakligir fyrilestrar

### TÁ TÚ SKALT HAVA...
...fakligar framløgur, sum geva meining og sum skulu festa seg, er umráðandi at hava rætta framløguteknikkin uppá pláss. Góður framløguteknikkur hevur alt at siga, um tú skalt fáa tín boðskap fram.

Eitt nú, tá tú skalt leggja fram fíggjarella marknaðarætlan, strategi, uppskot, úrslit og annað.

Hvussu fært tú boðskapin fram uttan at virka keðilig/-ur?

Hvussu fyrireikar tú teg best?

Hvussu tryggjar tú, at tú kennir teg væl?

Hvat nú um teknikkurin svíkir?

Hvat gjørt tú, tá tú hevur atfinningarsamar áhoyrarar?

### KOM Á SKEIÐ 8. OKTOBER...
...og lær hvat virkar best fyri teg persónliga.

### HVÍ LUTTAKA?

Tú lærir at fyrireika teg betri, áðrenn tú skalt leggja fram

Tú fært nøkur amboð til at skipa sjálvt tilfarið

Tú lærir, hvussu tú fært uppmerksamheitina frá áhoyrarunum - og heldur hana

Tú lærir at upptraðka trúverdugt uttan at virka keðilig/ur

Tú lærir at blíva bevíst um, hvat virkar best fyri teg persónliga

Tú fært 4 leiðreglur, sum gera teg til ein betri fyrilestrarhaldara

### SKEIÐIÐ VENDIR SÆR TIL...
...fólk, ið ynskja at menna sín førleika at fyrireika og halda fakligir fyrilestrar - við og uttan PowerPoint.

Hetta bæði tá tað snýr seg um formidling til fólk við somu fyritreytum sum uppleggshaldarin og til ein breiðan hóp, sum ikki hevur somu fyritreytir.

### TILMELDINGARFREIST...
...17. september 2009. Les meira á heimasíðu okkara www.synergi.fo, ella slá uppá tráðin tel. 32BELL - og tað er tað sama sum 322 355.

*Lær tað í dag, brúka tað í morgin...*



Synergi

Meiningin við Synergi er at geva føroyska samfelagnum íblástur og meirvitan. Soleiðis fáa vit eitt betri samfelag, betri fyritøkur og glaðari og enn meiri eldhugað starvsfólk.